# Kunngerðablaðið A

2022

Givið út 25. mars 2022

Nr. 33

24. mars 2022

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn**
(Skipanin við frítíðarlønarkontum verður broytt, Frítíðargrunnurin verður avtikin o.a.)

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn, sum broytt við løgtingslóg nr. 70 frá 2. apríl 1993, løgtingslóg nr. 40 frá 14. mars 1995, løgtingslóg nr. 75 frá 20. mai 1996, løgtingslóg nr. 67 frá 23. mai 1997 og løgtingslóg nr. 56 frá 16. mai 2006, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:
“**(Frítíðarlógin)**”

**2.** Í § 1 verður “lóg” broytt til: “løgtingslóg”.

**3.** Í § 2 verður “lógina” broytt til: “løgtingslógina”.

**4.** Í § 3, stk. 1 verður “lóg” tvær staðni broytt til: “løgtingslóg” og “landsstýrið” broytt til: “landsstýrismaðurin”.

**5.** Í § 3, stk. 2 verður “Landsstýrið” broytt til: “Landsstýrismaðurin” og “lóg” broytt til: “løgtingslóg”.

**6.** Í § 3, stk. 3 verður “lóg minkar” broytt til: “løgtingslóg minkar”.

**7.** Í § 4 verður “Landsstýrið” broytt til: “Landsstýrismaðurin” og “lóg” broytt til: “løgtingslóg”.

**8.** Í § 5, stk. 2 verður “lóg” broytt til: “løgtingslóg”.

**9.** Í § 13, stk. 3 verður “landsstýrinum” broytt til: “landsstýrismanninum í fíggjarmálum”.

**10.** Í § 14 verður “lóg” broytt til: “løgtingslóg”.

**11.** Í § 15 verður “landsstýrið” broytt til: “landsstýrismaðurin” og “lóg” broytt til: “løgtingslóg”.

**12.** Í § 17, stk. 3 verður “í Frítíðargrunnin” broytt til: “í landskassan”.

**13.** § 18 verður orðað soleiðis:

“**§ 18.** Krøv um frítíðarløn, ið ikki eru fráboðað TAKS í seinasta lagi 5 ár frá tí degi, frítíðarlønin er tøk, eru fyrnað.
*Stk. 2.* Frítíðarløn, sum er fyrnað, fer í landskassan.”

**14.** § 20 a verður orðað soleiðis:

“**§ 20 a.** Arbeiðsgevarin skal um góðkent avrokningarstað rinda frítíðarlønina á frítíðarlønarkontu, sum TAKS umsitur.
*Stk. 2.* TAKS umsitur inngjald og útgjald av frítíðarløn. Landskassin ber kostnaðin av hesum, sbr. tó stk. 3 og § 21, stk. 3.
*Stk. 3.* Løntakarafeløg, sum brúka álmanakkaárið sum innvinningarár, rinda TAKS fyri at umsita inngjald og útgjald av frítíðarløn.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu inngjøld og útgjøld verða skipað.”

**15.** Heitið á kapittul 6 verður orðað soleiðis:
“**Avtøka av Frítíðargrunninum**”

**16.** § 21 verður orðað soleiðis:

“**§ 21.** Frítíðargrunnurin verður avtikin, og fæ grunsins verður flutt Granskingarráðnum og markað til gransking í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum, sbr. tó stk. 2-3. Granskingarráðið umsitur peningin eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.
*Stk. 2.* Av fæi grunsins verða fluttar Frítíðargrunninum 1 mió. kr., sum skulu brúkast til at

fíggja munin á frítíðarlønarkontu og til at gera upp og enda Frítíðargrunnin.

*Stk. 3.* Av fæi grunsins verða fluttar landskassanum 2 mió. kr. at fíggja umsitingina av frítíðarlønarkontunum tað fyrsta árið.

*Stk. 4.* Sitandi nevnd fyri Frítíðargrunnin heldur fram at virka til 1. apríl 2023, tá grunnurin verður gjørdur upp og rakstraravlopið flutt Granskingarráðnum."

**17.** § 22 verður orðað soleiðis:

"**§ 22.** Við sekt verður revsaður

1) arbeiðsgevari, sum uttan rímiliga orsøk letur vera við at gjalda vunna frítíðarløn, løn í frítíðini ella frítíðaráskoyti, hóast hann verður kravdur,
2) arbeiðsgevari, sum ger avtalu um at siga frá sær skylduna at veita frítíðarløn, løn í frítíðini ella frítíðaráskoyti, og
3) persónur, sum ger avtalu av avhending av rætti til vunna frítíðarløn.

*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Stk. 3.* Í reglum, givnar við heimild í løgtingslógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar verður revsað við sekt."

**18.** Danski tvíteksturin í lógini verður settur úr gildi.

## § 2

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 2022, sbr. tó § 3.

*Stk. 2.* Frá 1. apríl 2022 skal øll frítíðarløn verða rindað á frítíðarlønarkontu hjá TAKS.

## § 3

*Stk. 1.* Stuðul sambært umsókn til tiltøk, ið útvega løntakarunum frítíðarmøguleikar, sbr. § 21, stk. 3, í løgtingslógini og § 1 í kunngerð um virki og fyrisiting av frítíðargrunninum, sum Frítíðargrunnurin hevur játtað, men ikki útgoldið, tá ið løgtingslógin fær gildi, verður støðlaður á kontu hjá TAKS til og við 1. apríl 2023.

*Stk. 2.* Játtaður stuðul, sum ikki er útgoldin 1. apríl 2023, fellur burtur, og peningurin verður fluttur Granskingarráðnum, sbr. § 21, stk. 2.

Í Tinganesi, 24. mars 2022

**Bárður á Steig Nielsen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 71/2021